umhvørvisstovan

FÁMJINS KOMMUNA
TRAÐARVEGUR 15
870 FÁMJIN
FØROYAR

Argir hin 24. mai 2011
Málsnr.: 11/00028-12
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Viðvíkjandi: Spillivatnsætlanin hjá Fámjins kommunu er góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 24.05.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29 oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Fámjins kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

Umhvørvisstovan fekk hin 02.05.2011 spillivatnsætlanina til góðkenningar (mál nr. 11/00028-7). Ætlanin er gjørd av HMP Consult, ráðgevandi verkfrøðingum. Í sambandi við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan verið í samband við HMP Consult, og 05.05.2011 varð dagførd ætlan send Umhvørvisstovuni til góðkenningar (mál nr. 11/00028-10).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í spillivatnsætlanini, ið varð send 05.05.2011, verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn. Hetta merkir, at spillivatnsætlanin m.a. fevnir um spillivatn frá øllum húsarhaldum, virkjum og virksemi í kommununi, og at spillivatnið eftir reinsing verður leitt gjøgnum lokaða skipan beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti.

Fámjins kommuna hevur tó søkt um undantak frá ásetingunum í § 11, stk. 1 í kunngerðini um spillivatn, sum sigur at spillivatnsleiðingar skulu í minsta lagi verða ein metur undir størstu fjøru. Í Fámjin er bara ein spillivatnsútleiðing, og verður undantakið givið við heimild í § 11, stk. 2 í kunngerðini um spillivatn við fylgjandi grundgevingum:

1. Hóast munnin á spillivatnsútleiðingini er 70 metrar úr landi, kemur rørið undan teir fáu dagarnar um árið tá størsta fjøra er.
2. Útleiðingin varð gjørd fyri skjótt 10 árum síðani, og sæst eingin sjónlig slóð ella uppsavnan frá útleiðingini.

Hin 10.05.2011 sendi Fámjins kommuna Umhvørvisstovuni teldupost (mál nr. 11/00028-11), har tað framgongur, at Fámjins kommuna á fundi tann 09.05.2011 hevur samtykt spillivatnsætlanina, ið HMP Consult hevur gjørt.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, tvs. tann umhvørvisliga partin av spillivatnsætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensioneringin o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10, stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

Vinaliga

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit**: sp/f HMP Consult, Óluvugøta 12, 100 Tórshavn

umhvørvisstovan Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf. +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo